Nr. 5. 7. desember 1984.

# Rundskriv

## um serundirvísing vaksnamanna

Við heimild í § 6 nr. 3 og § 9, 2. stk. í løgtingslóg nr. 70 frá 30. juni 1983 um frítíðarundirvísing v. m. ásetir Landsskúlaráðið hesar reglur um stovnseting av bólkum í serundirvísing:

**§ 1.** Kommunurnar seta á stovn serundirvísing fyri fólk, sum eru eldri enn 14 ár. Henda serundirvísing fevnir um: lesi-, stavi-, rørslu-, hoyrn-, sjón-, talu- og máltrupulleikar, álvarligar innlærutrupulleikar, sinnisligar trupulleikar o. a.

**§ 2.** Serundirvísingarbólkar kunnu verða settir á stovn, um so er, at í minsta lagi 5 næmingar hava boðað frá luttøku.
2. stk. Javnsettir bólkar kunnu bert verða settir á stovn, um so er, at í minsta lagi 10 næmingar eru í bólkinum.
3. stk. Landsskúlafyrisitingin kann í serstøkum føri góðkenna eitt lægri luttakaratal, herímillum einstaklingsundirvísing.
4. stk. Landsskúlafyrisitingin tekur støðu til, hvørt næmingur kann taka lut í serundirvísing ella ikki.

**§ 3.** Undirvísingin skal lúka hesar treytir:
1) Undirvísingin skal verða skipað soleiðis, at hon í mest møguligan mun lagar seg eftir brekum teirra, sum í bólkinum eru, eins og miðað verður ímóti at bøta um hesi brek.
2) Lærarin skal hava neyðuga útbúgving til tess at kunna átaka sær umrøddu serundirvísing.

**§ 4.** Serundirvísing kann verða skipað á einum stovni v.m., treytað av, at hon er skipað eftir §§ 1, 2 og 3, og at hon ikki er partur av teirri undirvísing, ið verður givin sambært aðrari lóggávu.
2. stk. Lærari, ið starvast á stovninum, kann bert geva serundirvísing uttan fyri arbeiðstíðina.

**§ 5.** Fólk, ið ikki hava føroyskt sum móðurmál, men eru skrásett í fólkayvirlitinum í Føroyum, kunnu fáa undirvísing í føroyskum máli og føroyskari mentan sambært § 1, 2 og 3.

**§ 6.** Skúlin eigur at útvega sær neyðugar upplýsingar frá serkønum fólkum sum t. d. serlærarum, serráðgevum, læknum o.ø. viðvíkjandi næmingum í sambandi við skipan av serundirvísing.
2. stk. Eingin serundirvísing kann byrja, fyrr enn Landsskúlafyrisitingin hevur góðkent uppskot skúlans um, hvussu serundirvísingin verður skipað, og hvat vav og innihald hennara er.
3. stk. Landsskúlafyrisitingin kann skipa fyri námsfrøðiligari/sálarfrøðiligari kanning av teimum næmingum, ið hava teknað seg til serundirvísing.

**§ 9.** Landsskúlafyrisitingin kann í neyðugum vavi gera frávik frá ásetingunum í hesi reglugerð.

**§ 10.** Hetta rundskrivið kemur í gildi beinanvegin.

Landsskúlafyrisitingin, 7. desember 1984.

***Ludvig Petersen***

*/ P. J. Sigvardsen*